## Leita eftir brævsendara

Enn veit danska løgreglan ikki, um hóttanarbrævið ímóti Piu Kjærsgaard, formanni í Danska Fólkaflokkinum, skal takast í álvara. Fimm menn eru skuldsettir í málinum, men hvørki avhoyringar ella rannsóknir heima hjá teimum fimm kundu vátta tað, sum stóð í brævinum, sigur løgreglan í Keypmannahavn. Kanningarnar hjá løgregluni halda kortini fram. Sambært fleiri fjølmiðlum stóð í brævinum, at tann, sum beinir fyri Piu Kjærsgaard, fær 500.000 krónur í samsýning, men hetta veit løgreglan einki um, sigur Jørn Åbye hjá løgregluni í Keypmannahavn við Ritzau.



## Kavin tømir kassarnar

Kavin hevur ligið óvanliga leingi í Danmark í vetur, og útreiðslurnar til kavagrevstur síggjast nú aftur í teimum kommunalu kassunum. Eitt nú hevði kommunustýrið í Keypmannahavn sett 14 milliónir krónur á fíggjarætlanina til kavagrevstur í ár, men longu nú hevur kommunamn brúkt 17 milliónir krónur síðani á nýggjárinum, skrivar DR. Sambært kommunufelagnum vænta kommunurnar, at útreiðslurnar til kavagrevstur fara millum 25 og 50 prosent upp um játtanina í ár. Úrslitið er, at í nógvum býum verða bara høvuðsgøturnar grivnar.

# Gera avtalu við Ísland um sjúkraviðgerð

**Heilsuverkini í Føroyum og í Íslandi eru við at gera avtalu um, at føroyingar kunnu fara á Landspitali í Reykjavík at fáa viðgerð fyri sjúku**

SJÚKRAHÚSVERK

*Randi Jacobsen*
*randi@sosialurin.fo*

Seinastu árini hava nakrir føroyskir sjúklingar verið á Landsspitalinum í Reykjavík í staðin fyri á Ríkissjúkrahúsinum í Keypmannahavn og fingið viðgerð.

Eingin føst skipan hevur verið, sjúkrahúsverkið í Føroyum hevur bara gjørt avtalu við Landspitalið í hvørjum einstøkum føri.

Men nú er ein formlig avtala komin undir land.

Aksel Johannesen, landsstýrismaður í heilsumálum sigur, at Landssjúkrahúsið og Landspitalið hava góðtikið avtaluna, sum føroyska heilsumálaráðið hevur undirskrivað. Eftir er bara at fáa undirskriftina frá íslendska heilsumálaráðnum.

- Vit hava rykt fleiri ferðir, og tí vænti eg, at avtalan verður endaliga undirskrivað fyrsta dagin, sigur Aksel Johannesen.

Arbeiðið við at fáa hesa avtalu byrjaðu longu, tá ið Hans Pauli Strøm var landsstýrismaður í heilsumálum.

Tað eru mest krabbameinssjúklingar, sum hava verið í Íslandi í staðin fyri í Danmark og fingið viðgerð. Ísland hevur peikað á, at úrslitini av krabbameinsviðgerð har hava verið góð. Okkurt árið hava úrslitini verið betri enn í Danmark.

Tað verður upp til yvirlæknan at avgera, um ein sjúklingur skal sendast til Landspitalið ella á Ríkissjúkrhúsið at fáa viðgerð. Atlit verða tikin til, hvar úrslitini eru best, hvør kostnaðurin er, hvar bíðitíðin er styttri o.a.

- Eg haldi tað vera gott, at vit fáa fleiri møguleikar at velja ímillum, sigur Aksel Johannesen.



*Um stutta tíð verður tað formliga í lagi, so føroyingar kunnu fara á Landspitalið í Íslandi at fáa sjúkraviðgerð í staðin fyri at fara á Ríkissjúkrahúsið í Keypmannahavn*

# Alt ruddað aftur

**Tá ið arbreiðsdagurin hósdagin var av, vóru allir sekkirnir av skitnum klæðum og burturkasti fingnir av vegnum á Landssjúkrahúsinum**

PORTØRAR

*Randi Jacobsen*
*randi@sosialurin.fo*

Samstundis sum semingsroyndin um portørsáttmálan millum Starvsmannafelagið og lønardeildina hjá Fíggjarmálaráðnum byrjaði hósmorgunin, fóru portørarnir aftur til arbeiðis. Verkfallið varð avlýst og verður bara tikið uppaftur, um semingsroyndin miseydnast.

Tá ið portørarnir møttu aftur hósmorgunin, brutu teir upp um armar at rudda burtur sekkirnar við skitnum klæðum og burturkasti, sum hevði hópað seg upp undir verkfallinum.

Einir 10 menn fóru í gongd, og teir góvu boð til deildirnar um at órógva teir sum minst henda dagin.

Portørarar komu eisini aðra staðni frá eftir sjúklingum, og teir hjálptu eisini til.

Tá ið klokkan var 16, og vanligi arbeiðsdagurin var av, var alt fingið av vegnum.

Hósdagin vórðu nakrir liðugt viðgjørdir sjúklingr, sum strandaðir vóru á Landssjúkrahúsinum orsakað av verkfallinum, fluttir heim, og nakrir eru fluttir heim í dag.

Á middegi í dag var framvegis einki at frætta frá seminsgroyndini á Hotel Føroyum. Partarnir hava fingið bo frá semingsmonnunum um einki at siga, og semingsmenninir Jógvan Amonsson og Alfred Petersensiga einki.

Jógvan Amansson semingsmaður vildi einki upplýsa um, hvussu gekst. Teir høvdu tosað við báðar partar sær, og ætlanin var at



*Nú er allir dungarnir fingir av vegnum*
*Mynd: Jens Kristian Vang*